| **Bólkur:** Einkultfak | **Skeiðsnavn:** Virkisbúskapur | **Skeiðsnummar:** 501 |
|---|---|---|
| **Plaserað:** 4. lestrarhálvár | **Varir:** Eitt hálvár | **ECTS:** 5 |
| **Støða:** Kravd lærugrein | **Gjørt:** 17-06-2005 | **Viderað:** 27-09-2015 |

| | |
|---|---|
| **Endamál:** | At tann lesandi fær grundleggjandi førleika til, á einum praktiskum og teoretiskum grundarlagi, at skilja og gera nýtslu av týdningarmiklum búskaparligum stýringsamboðum fyri vinnuligt virksemi. |
| **Høvuðsinnihald:** | Definitión og klassifikatión av grundleggjandi búskaparligum og roknskaparligum hugtøkum. Inntøku- og kostnaðarlæra. Uppseting av rakstrarroknskapi, pengastreymi og fíggjarstøðu. Gerð av fíggjarætlan. Roknskapargreining, harundir lýsing av rentabiliteti, vinningsføri, kapitaltillaging, gjaldføri og solvens. Íløgulæra við atliti til innsett tilfeingi, framtíðar inntøkur/sparingar, restvirði og ymisk krøv til avkast og viðkvæmisgreiningar. Optimering/finna bestu sølunøgd í mun til broytiligt inntøku- og kostnaðarmynstur, avmarkað tilfeingi og ymiskar kappingartreytir. Nýtsla av teoretiskum modellum og praktiskum metodum við rokniarki sum høvuðsamboði.<br>Eftir lokið skeið skal tann lesandi skilja hugtøkini framleiðsla/ søla/ inngjøld og keyp/kostnaður/útgjøld og verða førur fyri at seta ein rakstrarroknskap upp, rokna tøkan pening til ymiskar tíðir og seta fíggjarstøðu upp. Duga at gera fíggjarætlan og skilja týdningin av henni sum stýringsamboð. Duga at rokna og greina lyklatøl, sum lýsa roknskaparligu gongdina og at meta um gongdina í mun til onnur virkir og virkisbólkar. Duga at rokna kapitalvirði og meta um ein rakstraríløga er lønandi. Skilja mest vanligu fíggjarhættirnar. Kenna teir klassisku kappingarformarnar og duga at optimera sølunøgd í mun til ymisk inntøku- og kostnaðarmynstur.<br>**Ársroknskapur**<br>Business-line, Rakstur, Fíggjarstøða, Ársfrágreiðing<br>**Budgettering**<br>Rakstur, Gjaldføri, Fíggjarstøða, Avvik<br>**Kostnaðir**<br>Broytiligir kostnaðir, Fastir kostnaðir, Eindarútrokningar, Øvugtar eindarútrokningar<br>**Íløgur**<br>Kapitalisering av framtíðar inntøkum, Útrokningarmátar<br>**Kapitaltørvur**<br>Handilsvirkið, Framleiðsluvirkið<br>**Fígging**<br>Eginfígging, Lánsfígging, Ognarar – skuldarar, Onnur fígging |
| **Undirvísingarháttur:** | Fyrilestur, uppgávur á talvuni, uppgávur í flokkinum og heimauppgávur. |
| **Kravdar fortreytir:** | Støddfrøði 2 (Skeið 112) |
| **Fortreytir góðar at hava:** | |
| **Evaluering:** | Skrivlig próvtøka, har øll amboð eru loyvd.<br>Próvtal eftir 7-trins stiganum. |

| | |
|---|---|
| **Vegleiðandi undirvísingartilfar:** | Virksomhedsøkonomi við Waarst – Bang – Reventlow, seinasta útgáva. Forlag: Gyldendal |
| **Viðmerkingar:** | Fyri at sleppa til próvtøku skulu ásetingar skúlans um uppgávuavleveringar lúkast |
| **Ábyrgdari:** | IJ |